# Toppdystur í Vestmanna

**Tveir av biðlunum til bronsumerkini, STÍF og Kyndil, møtast í spennandi dysti á Skála**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*



*Fremstu liðini í kvinnudeildini, VB og VÍF, bresta saman í Vestmanna sunnudagin. Vinnur VB dystin, so skal eitt undur til, um tær ikki gerast greipuvinnarar í ár.*
*Mynd: Savnsmynd*

Toppdystur er í Vestmanna leygardagin, tá fremstu liðini í kvinnudeildini, VB og VÍF, bresta saman. Í løtuni eru fýra stig ímillum liðini, og vinnur VB leygardagin, skal eitt undur til, um tær ikki gerast greipuvinnarar.

Vágskvinnur hava verið einaráðandi stóran part av kappingarárinum, og enn hava tær ikki sett stig til í endaspælinum. Fyrri dysturin í endaspælinum endaði við stórsigri á 25-16 til VB. Í steypafinaluni var tað eisini VB, sum stóð seg best, og tí eru tær lítil favorittur undan dystinum í Vestmanna.

Hjá VÍF er dysturin seinasta útkall, um liðið skal endurvinna meistaraheitið. Tær hava verið nakað svingandi í ár, men vinna tær á VB, kemur rættiligur spenningur í kvinnukappingina aftur.

VÍF vann stórsigur á VB í grundspælinum í Vestmanna, og um tað skal endurtakast, so er av stórum týdningi at tær megna at taka broddin av Daivu Tuomaite og Redu Kurkauskiene, sum báðar mugu vera evni til ársins spælari í kvinnudeildini í ár.

Neistin og Tjaldur spæla botndyst í høllini á Hálsi sunnudagin. Bæði liðini hava ikki havt av bestu kappingarárum. Neistin, sum mest vinnandi felagið í kvinnuhondbólti ígjøgnum tíðina, hevur als ikki liva upp til vónirnar settar vórðu til tær undan kappingarárinum.

Í endaspælinum hevur gingið misjavnt, glottarnir ímóti Stjørnuni og STÍF gera, at felagið framvegis er við í kappingini um bronsumerkini. Tað eru fýra stig upp til Stjørnuna og Kyndil, og kravið er ein sigur ímóti Tjaldri, um frástøðan til bronsuplássini skal minka. Seinast liðini møttust, vunnu Tjaldurskvinnur, so heimaliðið hevur nakað hevna, síðan seinast.

Á Skála møtast STÍF og Kyndil, sum bæði eru við í bronsustríðnum. Kyndil hevur vunnið allar dystirnar ímóti í ár, men fyrri dysturin í endaspælinum var tættur, og tí er ongin favorittur undan dystinum. Liðini liggja ájøvn í stigartalvuni, og er væntandi talan um ein tættan og spennandi dyst á Skála sunnudagin.

## Yvirlit yvir dystirnar um vikuskiftið

**Hondbóltur**

**1.deild kvinnur**
160303 14.30 STÍF-Kyndil
160303 14.30 Neistin-Tjaldur
160303 16.00 VÍF-VB

**1.deild menn**
160303 16.00 STÍF-Kyndil
160303 16.00 Neistin-KÍF
160303 14.30 VÍF-H71

**Flogbóltur**

**Meistaradeild kvinnur**
150303 13.00 ÍF-KÍF
150303 13.00 Mjølnir-Fleyr
150303 13.00 TB-Dráttur

**Meistaradeildin menn**
150303 15.00 Mjølnir-Fleyr
150303 15.00 ÍF-Fram

# Strandingar møguleika at hevna steypafinaluna

**VÍF hevur tapt seinastu tveir dystirnar, og skulu reisa ímóti hoyvíkingum, um teir framvegis ætla sær at hótta strandingar**

MANSHONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

STÍF far sunnudagin vitjan av Kyndil í høllini á Skála. Strandingar liggja í løtuni á odda í landskappingini, men teir møta einum sera væl leikandi Kyndilsliði.

Havnarliðið hevur seinastu vikurnar víst stórspæl, og vinna teir á Skála sunnudagin, eru teir brádliga við í kappingini um gullkrónurnar í landskappingini. Henda støða var óhugsandi fyri nøkrum vikum síðan, men steypasigurin á júst STÌF tykist hava givið Kyndli eitt skump.

Strandingar høvdu frí seinasta vikuskiftið, men í seinasta dysti teirra vístu teir stórspæl ímóti vestmenninginum. Finna teir tað spælið fram aftur, verður tað rættiliga torført hjá Kyndilsmonnum at koppa strandingum.

Tá liðini møttust í grundspælinum á Skála, vundu STÍF úr Kyndli, men síðan tann dystin er nógv broytt. Ikki ber til at geva nøkrum liðið favoritt leiklutin, tí dysturin er heilt opin.

### VÍF skal reisa seg

Tað hevur gingið sera illa í hond hjá vestmenningum seinastu vikurnar. Teir hava tapt fyri bæði STÍF og Kyndli, og eru í løtuni tvey stig eftir oddaliðið STÌF. Skulu teir framvegis hótta strandingar er neyðugt við einum sigri á H71 í Vestmanna sunnudagin.

Eftir rokdystin ímóti Kyndli seinasta vikuskiftið, hava vestmenningar valt at sekta Piti Negru við leikbanni restina av kappingarárinum, og hann verður tí ikki at síggja á liðnum hjá VÍF sunnudagin.

Hóast laku úrtøkuna hjá vestmenningum seinastu dystirnar, so hevur stórskjúttin, Áki Olsen, rættiliga bitið frá sær. Hann hevur verið nógv darvaður av skaða alt kappingarárið, men hann tykist rættiliga at komin fyri seg aftur.

Seinast VÍF og H71 spældu, vunnu hoyvíkingar rættiliga óvænta. Hoyvíkingar skulu hava ein av sínum heilt góðu døgum, um ein endurtøka av tí sigrinum skal gerast veruleiki. Spælið hjá H71 tykist at vera sera svingandi, men eingin kann taka frá teimum, at teir hava havt eitt gott endaspæl við fleiri óvæntaðum úrslitum.

Seinasti dysturin hjá monnum hetta vikuskiftið verður í Havn millum Neistin og KÍF. Bæði liðini hava havt eitt sera misjavnt endaspæl. Neistin lá óvænta í oddinum, tá farið varð undir endaspælið, men teir hava ikki víst somu taktir í endaspælinum sum í grundspælinum.

Seinast liðini brustu saman, vann Neistin tepurt við einum máli. Neistin má vera lítil favorittur undan dystinum, men misjøvnu úrslitini í endaspælinum gera, at kollfirðingar væl kunnu arga heimaliðið.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| stig | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 7 | 7 | - | 0 | - | 0 | 497 | 398 | 99 | 23 |
| 2 VÍF | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 441 | 365 | 76 | 19 |
| 3 Stjørnan | 8 | 2 | - | 1 | - | 5 | 429 | 431 | -2 | 13 |
| 4 Kyndil | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 460 | 465 | -5 | 13 |
| 5 StÍF | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 447 | 465 | -18 | 13 |
| 6 Neistin | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 380 | 420 | -40 | 9 |
| 7 Tjaldur | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 365 | 475 | -110 | 3 |

**1. Deild menn**

| stig | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 518 | 446 | 72 | 19 |
| 2 VÍF | 7 | 4 | - | 0 | - | 3 | 586 | 499 | 87 | 17 |
| 3 Kyndil | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 519 | 507 | 12 | 16 |
| 4 Neistin | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 529 | 506 | 23 | 14 |
| 5 KÍF | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 505 | 523 | -18 | 11 |
| 6 H71 | 7 | 4 | - | 0 | - | 3 | 486 | 545 | -59 | 11 |
| 7 Tjaldur | 7 | 0 | - | 1 | - | 6 | 471 | 588 | -117 | 4 |

**Flogbóltsstøður**
**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 19 | 16 | - | 3 | 52 | 22 | 30 | 24 |
| 2 Mjølnir | 19 | 15 | - | 4 | 51 | 18 | 33 | 23 |
| 3 TB | 19 | 13 | - | 6 | 47 | 21 | 26 | 18 |
| 4 Dráttur | 19 | 8 | - | 11 | 29 | 41 | -12 | 11 |
| 5 Fleyr | 19 | 3 | - | 16 | 14 | 50 | -36 | 5 |
| 6 KÍF | 19 | 2 | - | 17 | 11 | 52 | -41 | 3 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 15 | 13 | - | 2 | 41 | 9 | 32 | 18 |
| 2 SÍ | 16 | 9 | - | 7 | 30 | 24 | 6 | 15 |
| 3 Mjølnir | 15 | 9 | - | 6 | 30 | 23 | 7 | 13 |
| 4 Fram | 15 | 7 | - | 8 | 25 | 26 | -1 | 10 |
| 5 Fleyr | 15 | 0 | - | 15 | 1 | 45 | -44 | 0 |



# Stórfyritøkan Mærsk høvuðsstuðul hjá B36

**Mærsk ætlar við avtaluni at gerast sjónligari í Føroyum**

STUÐULSAVTALA
*Páll Holm Johannesen*




*Kristjan á Neystabø, formaður í B36, og Stig Albeck, marknaðarleiðari í Mærsk undirskriva helst størstu sponsoravtaluna í føroyskum fótbólti.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Seinnapartin hósdagin var tíðindafundur í B36-húsinum. Havnarfelagið boðaði frá, at tað hevur gjørt tveyára avtalu við donsku stórfyritøkuna Mærsk. Fíggjarligu viðurskiftini vórðu ikki upplýst, men avtalan millum B36 og Mærsk er helst størsta sponsoravtalan í føroyskum fótbólti.

Mærsk hevur seinastu tvey árini verið ein smærri stuðul hjá B36, og báðir partar hava verið sera væl nøgdir við samstarvið. Tá høvuðsavtalan hjá B36 við telefyritøkuna Kall rann út 1.januar, vendi leiðslan í felagnum seg til donsku fyritøkuna.

Partarnir vórðu samdir um at víðka um samstarvið, og hósdagin skrivaðu partarnir undir avtalu fyri tey næstu tvey árini. Umframt Mærsk, hevur B36 eisini gjørt avtalu við Jolly (Føroya Bjór), Kinarps (Farodane), Føroya Sparikassa og Havnar Timburhandil komandi tvey árini

Formaðurin, Kristjan á Neystabø, var sum vera man fegin um avtaluna. Hann bæði væntaði og vónaði, at báðir partar fóru at fáa nógv burturúr samstarvinum.

### Mærsk vil gerast sjónligari í Føroyum

Marknaðar leiðarin á Mærsk, Stig Albeck, var komin fyri Mærsk at undirskriva avtaluna. Hann segði eftir tíðindafundin við Sosialin, at avtalan við B36 var ein liður í at gera fyritøkuna sjónligari í Føroyum.

Mærsk hevur flogið til Føroya í góð 30 ár, men síðan kappingin harðnaði við Atlantic Airways, hevur fyritøkan ikki gjørt nógv við at lýsa í Føroyum.

Avtalan við B36 gevur, sambært Stig Albeck, Mærsk góðar møguleikar at kappast við Atlantic Airways um serliga ítróttarfólki. Marknaðarleiðarin vísti á møguleikarnar hjá Mærsk at seta Føroyar og B36 á landakortið úti í Evropa, tá B36 og onnur føroysk ítróttarlið velja at ferðast við Mærsk.

Eins og á tíðindafundinum, vildi Stig Albeck onki siga um, hvussu stóra upphædd Mærsk lat B36 um árið fyri vera høvuðsstuðul hjá felagnum.

# Nýggjar ljósmastrar í Gundadali

Tórshavnar Kommuna er í løtuni í fer við at seta fýra ljósmastrar upp á ovara vølli í Gundadali. Tað hevur leingið verið ringt ljós á ovara vølli, men nú ætlar so kommunan at bøta um tað.

Tað verður ein mastur í hvørjum horni, so nú skuldi vera laga manna at vant fótbólt í Gundadali seint um kvøldarnar.

**phj**




*Tórshavnar býráð er í løtuni fer við at seta ein ljósmastur í hvørt horn á ovara vølli í Gundadali*

STÍF-Stjørnan 28-21 (15-9)

# STÍF tevjar bronsuna

**Hóast mansverju av Astu Petrauskiene og Alinu Olaru, so megnaði STÌF kortini at vinna á Stjørnuni**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

STÍF hevði hóskvøldið vitjan Stjørnuni. Úrslitið var ein greiður sigur til heimaliðið, sum sostatt hevur vunnið seg á triðjaplássið saman við Kyndli og Stjørnuni í bestu kvinnudeildini.

STÍF legði seg frammum beinanvegin í dystinum, og tær hildu tørn allan dystin. Heimaliðið legði seg tíðliga frammum 5-1, og tann frástøðan millum liðini helt allan dystin

Av Skála verður sagt, at dysturin ikki var størsta hondbóltsupplivingin, men til tíðir var gott spæla at síggja.

### Mansverjan miseydnaðist

Hóast Stjørnan valdi at mansverja Asta Petrauskiene og Alina Olaru stóran part av dystinum, so fingu tær kortini flestu málini fyri heimaliðið

STÍF hevur fyrr í ár havt trupulleikar fyrr, at mótstøðuliðini at mansverja, men hóskvøldið gjørdi tað so ikki mun.

Stjørnan hevur ikki havt eitt gott endaspæl, og liðið hevur nú tapt fimm dystir.

Dysturin endaði heldur keðiligt, tá venjarin hjá Stjørnuni varð vístur av vølli, fyri at hava sagt nøkur borgarlið orð við dómararnar.

STÍF fara vitjan Kyndli sunnudagin, og vinna tær tann dystin, liggja tær best fyri í kappingini um bronsumerkini.

### Dysturin í tølum:

STÌF –Stjørnan 28-21 (15-9)
STÍF: Asta Petrauskiene 11, Alina Olaru 6, Anna Maria Berthelsen 6, Poula D. Olsen 3, Elin Jacobsen 1 og Sunfríð B. Jacobsen 1
Stjørnan: Danijela Ercevic 7, Natasa Spanenkovic 6, Joan M. Joensen 3, Bára S. Klakstein 3, Jastrid Gulakksen 2, Davina Sundskarð 1



*STÍF vann greiðan sigur á Stjørnuni á Skála hóskvøldið, og tær liggja nú væl fyri í stríðnum um bronsumerkini.*
*Mynd: Savnsmynd*